## DAGSINS MEINING

# Skonkiloyvi í gongu-gøtuni - ella ikki

Eingin ivast í, at tað liggur ein tung ábyrgd á loyvisnevndini. Nær skal hon lata skonkiloyvi. Hvar skal hon lata skonkiloyvi. Hvørjum skal hon lata skonkiloyvi. Er viðkomandi, skonkiloyvi verður latið, nóg álítiandi og ábyrgdarfullur o.s.fr. Tað er neyvan nøkur løtt uppgáva, tí tað kunnu óivað altíð setast spurnartekin við avgerðir hjá nevndini.

Men neyðugt er ikki hjá nevndini at skapa sær størri trupulleikar enn neyðugt. Tað hevur hon óivað gjørti einum aktuellum máli í høvuðsstaðnum, har hon hevur noktað at latið eitt skonkiloyvi í gongugøtuni. Sambært tí, sum alment er komið fram, hevur nevndin noktað at lata loyvi, tí veitingarhúsið liggur í gongugøtuni.

Frammanundan hevur Tórshavnar Kommuna viðmælt umsóknini um skonkiloyvi í kaffi- og matstovuni, sum vit framvegis kallað Kondittaríið. Grundgevingin hjá býráðsformanninum, Heðini Mortenen, er, at býráðið vil hava so nógv lív, fólk og virksemi sum møguligt í Miðbýnum. Hesum kunnu tey flestu taka undir við.

Harafturat skuldi júst ein gongugøta verið eitt tað besta plássið, sum er, til matstovuvirksemi. Tað er í eini gongugøtu fólk spáka og kanska "detta Inn" á gólvið a fáa sær ein kaffimunn, eina øl ella eitt glas av víni. Soleiðis er tað kring allan heimin, og soleiðis eigur tað eisini at vera í Føroyum.

Henda grundgevingin hjá loyvisnevndini er heldur ikki serliga haldbar. Vit skulu bara ganga nakrar fáat metrar niðan eftir einum sliski frá gongugøtuni, so enda vit í eini hugnaligari loftspub. Ganga vit hinvegin nakrar metrar oman eftir Sverrisgøtu - tað er Fransabrekkan - koma vit inn í eina aðra matstovu - niðri undir áðurnevndu loftsmatstovu - sum hevur skonkiloyvi! Hvar er logikkurin?

Alt sum hevur við øl og vín, matstovur og vertshús, og rúsdrekkapolitikk sum heild at gera, hevur síni mótstøðufólk og viðhaldsfólk - fyri og ímóti. Báðir partar skulu virðast, og tí er frálíkt, at slík mál koma alment fram, so fólk fáa høvi at koma við síni meining. Men eitt eru flest øll samd um, at alt sum hevur við rúsdrekka at gera skal fara fram við sømiligheit, undir væl skipaðum viðurskiftum og at brúkið eigur at verða tálmað sum mest.

Ein sannroynd er, at síðani vit fingu eina liberalari lóggávu á hesum øki, er ein stórur bati hendur. Í dag kunnu fólk fara inn á eitt verthús at fáa sær eitt glas og fólk kunnu njóta eitt glas saman við eini máltíð. Tað bar ikki til áður. Harafturat er "ballaríið" flutt frá gøtunum og inn í høli undir skipaðum viðurskiftum. Harafturat er nøgdin, sum seld verður, ikki vaksin tað, sum summi spáddu.

Tað er ikki loyvisnevndin, sum skal avgera, eftir flestra manna tykki, hvar og hvussu nógv loyvi skulu latast. Tað er ikki loyvisnevndin, sum skal reka býarskipanarpolitikk, sum býráðsformaðurin í Havn sigur. Og talið av skonkiloyvum eigur at avmarka seg sjálvt. Eru ov nógv latin, ja, so gevast tey, sum ikki fáa "biksina" at mala runt, tí veitingarstaðið er ikki nóg gott og hugnaligt.

**Sosialurin**

# Fiskivinnuskúlin bjóðar matvøruvinnuni á skeið




**Tíðin krevur, at tú dagførir tína vitan, og hetta er ikki minst galdandi fyri matvøruframleiðandi virki, sum virka til útflutnings ella til heimamarknaðin**

TÍÐINDASKRIV

Skeiðsrøðin vendir sær til matvøruframleiðandi virki á sjógvi og landi, sum longu hava eitt innaneftirlit, og tey virkini, sum framleiða til heimamarknaðin, og sum hava fingið boð um at skipa eitt innaneftirlit. Hetta merkir, at skeiðið er ætlað stjórum, góðskuleiðarum, formonnum og starvsfólki, sum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðnum og í framleiðsluni á virkinum.

Endamálið við skeiðnum er at flyta og betra hugburðin hjá luttakarunum og at økja um vitanina um matvørutrygd og innaneftirlit. Frálæruhátturin verður dynamiskur og aktiverandi. Evnini á skeiðnum verða viðgjørd úr ymsum sjónarhornum.

Málið við skeiðnum er, at luttakararnir skulu uppliva eitt áhugavert og spennandi skeið, at teir skulu fáa væl burturúr, og at evnini skulu vera viðkomandi. Undirvísingin verður á einum støði, har øll kunnu luttaka. Skeiðið er skipað við fyrilestrum, sum fólk frá vinnuni og tí almenna halda, og við kjaki og bólkaarbeiði. Luttakararnir fáa ikki nógv tilfar at lesa, men avrit av framløgum, og teir læra eisini, hvussu teir kunnu halda sína vitan viðlíka.

Tað serliga við hesum skeiðnum er ein uppfylging, sum er íroknað kostnaðin. Tá skeiðið er liðugt, bjóða fyrireikararnir seg til at koma út á arbeiðsplássini (2 tímar) at ráðgeva um ítøkiligar spurningar í sambandi við matvørutrygd og innaneftirlit.

Skeiðið verður skipað í tríggjar eindar á 2 dagar í mars og apríl, og kostnaðurin er 10.500 kr.

# Palle Bager´s hús selt til ergoterapi

TÍÐINDASKRIV

S P/F Ergo & Hjálpartól við Beintu við Sandá Lassen hevur keypt "Palle Bager´s hús", eisini nevnt húsini hjá Conrad Skaale í J. C Svabosgøtu í Havn.

Ergo & Hjálpartól hevur higartil hildi til í leigaða bygninginum við síðina av Palle Bager. Ergo & Hjálpartól fegnast um góðu gongdina sum hevur gjørt tað møguligt at ogna sær bygningin, sum er uml. 400 $m^2$ til støddar.

Í tí nýggja bygninginum fer Ergo & Hjálpartól at víðka um virksemi sítt, og far umframt nógv størri framsýningar- og handilshølið, eina nógv betri egnaða viðgerðastovu til ergoterapiina sum felagið eisini umfevnur.

Ergo & Hjálpartól flytir inn í høllini tá umvælingin er liðug.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.